# Tvey skriðulop í Hesti

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Um kvøldið minni vindur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið minni vindur av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur. Týsdagin minni vindur av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

**Har ein skriða er lopin, er onnur væntandi. Soleiðis var í Hesti um dagarnar, har fyrst ein skriða leyp – og síðan ein onnur og størri**

OMANLOP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fp*



Tað er ikki bara á Viðareiðisvegnum, tað leypir, tá ið vátveður er, og illa vil til. Fyrst í vikuni vóru eisini tvey skriðulop í Hesti.

Jacob Pauli Silvurstein í Hesti sigur, at tað heimara lopð var stutt norðanfyri minnisvarðan í bygdini.

– Tað skrædnaði úr miðjuni á fjallinum, og lopið fór at kalla heilt í havið.

Hann sigur, at grús og annað eyrtilfar legði seg tvørtur um vegin norðanfyri bygdina.

### Onnur skriða

Jacob veit at siga, at ein onnur skriða er lopin longur norðuri á oynni.

– Eg havi sjálvur ikki verið har norðuri og sæð hana, men tey siga, at hendan er lopin heilt undan eggini og í havið.

Spurdur, um fólk í Hesti ikki hava hoyrt nakað til omanlopini hesar báðar dagarnar, heldur hann ikki, at tey hava gjørt serliga nógv um seg.

– Nei, eg havi so einki hoyrt, sigur hann.

Sum skilst, er tað ikki vanligt, at tað loysnar úr fjallasíðuni í Hesti, men nú hendi tað so tvær ferðir – antin saman dag ella við einum degi ímillum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 15 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 28 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 971 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga móti Íslandi og dýpist enn. Brúgvalagið haðani til havið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing.




Lágtrýstið yviri á Suðurlandinum stendur mestsum í stað og grynnist. Sunnan fyri lágtrýstið rekur óstøðug luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/09 kl. 06⁰⁰–15/09. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 14/09 kl. 06⁰⁰–15/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 111,4 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

8. sept.: Mánin longst frá jørðini
14. sept.: Tendring
21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. sep | 09.18 | 21.39 | 08.18 | 20.39 | 08.33 | 20.54 | 11.18 | 23.39 | — | 12.18 | 07.33 | 19.54 | 06.33 | 18.54 | 09.33 | 21.54 | 10.33 | 22.54 | 09.03 | 21.24 | 10.18 | 22.39 |
| 18. sep | 10.01 | 22.23 | 09.01 | 21.23 | 09.16 | 21.38 | — | 12.01 | 00.39 | 13.01 | 08.16 | 20.38 | 07.16 | 19.38 | 10.16 | 22.38 | 11.16 | 23.38 | 09.46 | 22.08 | 11.01 | 23.23 |
| 19. sep | 10.47 | 23.11 | 09.47 | 22.11 | 10.02 | 22.26 | 00.23 | 12.47 | 01.23 | 13.47 | 09.02 | 21.26 | 08.02 | 20.26 | 11.02 | 23.26 | — | 12.02 | 10.32 | 22.56 | 11.47 | — |
| 20. sep | 11.37 | — | 10.37 | 23.04 | 10.52 | 23.19 | 01.11 | 13.37 | 02.11 | 14.37 | 09.52 | 22.19 | 08.52 | 21.19 | 11.52 | — | 00.26 | 12.52 | 11.22 | 23.49 | 00.11 | 12.37 |

5 707265 100050 >